

Vit eru komnir til seinast í apríl, og vit mundu ikki hava meira enn 1.000 fiskar tilsamans. So fara vit vesturum. Hetta hevur verið fyrst í mai. Tað var fínasta veður, og vit fara á ta gomlu leiðina, í Víkarálina, og har fingu vit fisk.

### Sleip við inntøkutapi uttan endurgjald

So boðar "Sigurfarið" frá, at teir høvdu mist skrúvuna og ynskir, at vit skulu sleipa skipið til Reykjavíkar. John hevði siglt við "Sigurfarinum" árið frammanundan við Urbanus Olsen. Vit høvdu mett okkum at hava kunnað fingið eini 14 skippund tann fyrsta dagin, eftir tí vit fingu fyrra partin av degnum. Hetta var rok, men vit fara at sigla til Sigurfarið, og tað gekk gott at sleipa. Tað gingu 4 døgn, frá tí vit fóru, og inntil vit vóru aftur í Víkarálini, og vit mettu okkum at hava mist eini 40 skippund av hesum sleipi.

Vit koma so heim, og tað gekk gott tann túrin. Nú er tað tryggingin fyri veiðutapið av sleipinum, sum greiða mátti fáast á.

Dánjal Jákup Vilhelm, sum arbeiddi á Skipasmiðjuni, fór til stjóran á tryggingina at tosa um hetta her. Men her fekst einki burturúr. Stjórin segði bert, at tað gamla var at siga takk. Tað var ein dummheit av okkum ikki at lata íslendingar taka "Sigurfarið", tí tá hevði tryggingin ikki sloppið undan at gjalda.

Dánjal Jákup Vilhelm segði, at tað nyttaði einki hjá okkum at leggja sak, tá roknast kundi við, at alt fór í sakarkostnaði. Soleiðis gekk tann túrurin.

### Ein annar túrur á Suðurlandinum

Vit fingu so uppí skipið tann túrin eisini. Hetta var rákaleið, tað kundi reka eftir øllum grunninum, og tað vóru slíkir skøltar (plinkar, mið) man kom um. Begynti man at fáa ein ella tveir kongafiskar, so var man sikkur upp á at fáa einar tveir dráttir. Tað ráddi um at fáa 8-10 skippund, og tað var so gott. Fólkið stóð stútt við lúnningina.

Eg minnist eina viku, tá vit sóu, hvussu nógv agn hevur at siga. Vit fóru út av Pátreksfjørðinum, har øll skipini høvdu ligið, og tey høvdu ligið leingi. Vit høvdu ringt agn ta vikuna. Vit eru so úti á Barðargrunninum. Skipini fáa nógvan fisk tann dagin alla ta vikuna, men vit fáa lítið. Tað var bert agnið, sum hevði skuldina. Vit føldu fisk, og skiparin skjeyt ritur til agn, men tað nyttaði einki. Vit kundu fáa 8 skippund og hini 18-20. Har fór tann vikan, og John fór ikki mitt í viku inn eftir agni.

John var ein driftigur maður, og hann vildi ikki missa nakran dag. Tá sunnudagurin kom, fóru vit rímiligt inn eftir agni. Tað var ofta, at man kundi fara inn á Sugandafjørðin, tí tað var stutt at fara út frá har. Leiðin gekk út frá Ísafjørðinum, tí hetta var ein so deilig leið og ójavnt dýpi. Og har kundu vit fáa ein dag meira enn hini skipini fingu. John hevði eisini ein skikk, tá tað var landnyrðingur ella eysturætt, at royna skáan út frá Fuglatanganum. Man sá út á bakkan, um tað vóru líkindi at fara út. Har skáðaði út um Breiðubuktina. Tað var ikki altíð at tað var fiskur. Eg minnist, at vit kundu liggja har og fáa nakrar fáar fiskar, ikki størri enn seiður. Men einaferð komu vit í eina toskatorvu. Tað minnist eg so sera væl. Tað stóð so deiliga væl niður, so tað var einki trol (tá snørini fløkjast inn í hvørt annað). Tað var eitt passaligt lot, og snørini stóðu leys frá skipinum.

### Skoytti uppí snørið

Mær dámdi at hava fleiri húkar á teininum, men okkum dámdu ikki at hava hesar nylongreiðirnar tá. Skiparanum dámdi betri tær gomlu greiðirnar við tveimum húkum, og tað gjørdi ein partur av mannskapinum eisini. So vit góvust at brúka snelluna, sum annars var roknað fyri at vera eitt stórt framstig.

Og hendan dagin var ein forferdiligur fiskur. Eg minnist, at tað var smáur toskur, millumfiskur, 22" til longdar. Eg minnist, at tað var eingin fíling. Fiskurin tók beinanvegin, sum loddið kom niður, og eg fekk 3 og 4 fiskar á hvørja ta einastu ferð. Hetta er tað móðasta, eg havi verið við lúnningina, hóast tað ikki var langur dagur. Eg fekk hendan dagin 280 fiskar, og miðlingarnir lógu um 180. Eg fekk 100 meira enn miðlingarnir, og man hetta vera tí, at eg hevði eyka húkar.

Og nú vit fara at reinsa.

*Teir taka sær av løttum á heimferð. F.v. Jákup Martin Joensen og Jógvan Petersen.*



Ein maður, sum stóð aftan fyri stórvantið, hevði fingið 180 fiskar, og hann var óður, tí hann skuldi arbeiða fyri meg. Soleiðis var tað í sjálvdrátti. Hetta gjørdist ein óføra góður dagur.

### Onnur hending.

Ein annan dag okkurt ár frammanundan liggja vit á Skáanum, men tá var so nógv alda. Tað var ein leygardag, og skipini lógu øll inni. Vit lógu einsamallir úti, tað var so ógemeint veður. Nú koma vit inn á Patreksfjørðin ein sunnumorgun. Vit høvdu mált 14 skippund niður, og tað var altíð góð vekt hjá okkum. Vit máldi ongantíð meira enn 400 skippund niður og høvdu upp til 560 skippund, tá landað varð. Kurvarnar vóru rokaðar, og var ein hálv kurv, fór hon til góða vekt.

Tá var ringt lag á hinum skipunum. Tey lógu inni leygardagin, meðan vit høvdu rokast.

Ein dagin vit lógu í Víkarálini, nú kemur ein stórur súluflokkur. Vit fingu væl av fiski, og súlurnar stoyttu seg niður eftir fiskinum, sum var á snørinum. Vit fingu fleiri súlur, men sleptu teimum avstað aftur. Tær vóru svangar. Tá vit fóru at reinsa, var lag á súlunum.

Vestanmenn, sum royndu á norðurlandinum, dámdu ikki at royna longur enn til hálvan september, tá heystaldan var komin. Tá var næstan ikki farandi framvið har á landnyrðingi, tað bleiv so sera ringur sjógvur.

Tað vóru tveir mánaðir frá tí vit vóru á Oyndarfirði, til vit komu aftur á Oyndarfjørð við 560 skippundum annað árið og 563 skippundum annað árið.

Tað var grúilig, sum Meinhard Emil var raskur. Hann var lastamaður, og tað var ikki hissini avrek at arbeiða ta lastina einsamallur og afturat tí at vera miðlingur at fiska.

### Lomvigur sum pisur

Trý tey fyrstu árini høvdu vit eina lomvigu hvørt árið. Tær blivu so sera spakar. Tær sótu á flekiborðinum, og um náttina gingu tær í vaskikassanum. Tað var ein stuttleiki at hava tær umborð. Teimum dámdu væl nebbasild og kundu fara á flog um dagin, men komu altíð aftur. Eina ferð høvdu vit eina álku eisini, men tær riggaðu ikki saman, og lomvigan rýmdi at enda.

Tann triðja pisan, sum vit høvdu, var framvegis við, tá vit vóru á veg heim. Tað var eitt frískt lot av landnyrðingi, men tað var góð ársins tíð. Vit koma til Mánaðaroyggjarnar. Tað er sum ein skergarður (norðan fyri Rauðasand), og tað blívur so ringur sjógvur, men tað var einki ódnarveður. Tá høvdu vit lomviguna í skutinum á bátinum. Tann lítli ritubáturin stóð í stóli á dekkinum, og bjargingarbáturin stóð í gálgum framman fyri stórmastrina. Og vit fingu eitt brot, tað hevur verið eitt grunnbrot. Báturin fór, og annað beinið á stólinum skræddi ein planka úr dekkinum, av tí at surringin stóð niður gjøgnum dekkið, og so var ein jarnpláta uppi undir. Plankin var tó ikki ordiliga leysur, og vit fingu dunkað hann nøkulunda niður við eini sleggju. So vit við margarini at smyrja, har opið var, og so at negla skottini omanyvir. Lastin var smekkfull av fiski. Bátin sóu vit ikki aftur og heldur ikki lomviguna.

### Á sildaveiðu

Tað lá eisini stak væl fyri hjá John á sildaveiðu við gørnum. Vanliga gongdin var, at fyrst varð farið til Íslands við snøri og síðan á sild, tá komið var út á summarið. Hetta var eitt strævið lív, serliga tey fyrstu árini, tá vit ikki vóru so vanir við hendan veiðuháttin. Eisini vóru gørnini vánalig. Tey vóru úr hampi, sum vóru sera tung at arbeiða við. Eg minnist, at vit keyptu ein heilan reiðskap frá einum svenskum sildabáti. Men gørnini vóru buktarotin. Hetta førdi til nógva bøting, sum var ringt fyri hendurnar.

Sum árini gingu fingu vit so við og við nylongørn, og lætti hetta munandi um. Tey vóru lættari at arbeiða, og tey vóru nógv sterkari, so tað slapst undan bøting.

Á sildaveiðu var mannagongdin tann, at gørnini vóru sett seinnapartin á degi, og tey vórðu sett so hvørt, sum skipið rak undan vindinum. Vindurin avgjørdi tískil, hvussu skjótt tað gekk við setingini.

Drigið varð so morgunin eftir, og hvussu skjótt hetta gekk valdaðist eisini, hvussu nógv var í. Tá liðugt varð at draga skuldi gerast reint. Sildin varð avhøvdað og síðan saltað í tunnur. Síðan skuldu tunnurnar fyllast við saltlaka, og botnurin sláast í. Tá hetta varð gjørt, skuldu tunnurnar fáast niður í lastina. Hetta var sera strævið, tí hvør tunna vigaði meira enn 200 pund. »Álaker« rullaði illa, so tað hevur verið strævið hjá teimum sum stúvaðu í lastina. Kortini kundu lastamenn fáa nyttu burtur úr rullinum at fáa tunnur uppá pláss.

Tunnurnar vóru loraðir niður við spæli. Einaferð mundi verið galið, tá vit mistu eina tunnu í lastakarminum, men tíbetur var eingin undir.

Eg minnist serliga eina setu. Tað var nógv sild í gørnunum, og tá brast hann